


Caledonian Victory á Havnini fyri at skifta manning. Nýggja rutan í summar millum Føroyar og Edinburg kann gera, at fleiri av hesum skipum fara at koma til Føroya heldur skiparin. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Frá størstu oljukelduni í Europa til Føroya

Deil:

**Jan Müller**

10.02.2015 - 14:27

Oljan.fo

Hóast føroyingar flest, eftir teir turru brunnarnar í fjør, munnu hava smáar vónir til, at føroyska oljan verður funnin í bræði, so er stórt virksemi í grannalagnum, skamt frá føroyska-bretska markinum. Og føroyingar fáa hóast alt sín lítla bita av hesum virksemi, tó at hann er evarska lítil. Í hvussu er fáa vit eina kensla av, hvussu stórt og ógvusligt virksemi er í grannalagnum, tá frálandsskipini, sum ganga bori- og framleiðslupallum til handa, leggja leiðina henda vegin at skifta manning og keypa ymsar tænastur.

Og hóast skipini oftast fara í hetlendska ella skotska havn, tá tørvur er á ymsum tænastum, so kemur meira enn so fyri, at tey velja at fara til Føroya a skifta manning ella keypa tænastur.

Eitt av teimum heilt stóru frálandsskipunum, sum er til arbeiðis eystan fyri føroyska markið í løtuni, er Caledonian Victory, ið siglur millum framleiðslustøðirnar í økinum og veitir ymsar tænastur so sum bjarging og trygd. Skipið kom á Havnina mánadagin fyri at skifta manning.

Tað er so bert eitt av mongum hjálpar- og veitingarskipum, sum arbeiða í tí stóra økinum vestan fyri Hetland. Hóast lági oljuprísurin longu hevur ávirkað fleiri stórar verkætlanir og útbyggingar, so eru tær vestan fyri Hetland ikki nervaðar stórvegis av príslækkingunum. Ein orsøk er so tann, at hesar longu eru komnar so væl ávegis, at tað kann ikki loysa seg at steðga á. Eisini eru hesar útbyggingar av stórum týdningi fyri bæði oljufeløgini og myndugleikarnar í Bretlandi. Oljugoymslurnar í hesum økinum, tætt við Føroyar, hava ein stóran týdning fyri oljunýtsluna í Bretlandi.

Meðan hesin risin av einum oljuskipi varð á Havnini mánadagin, nýtti eisini oljan.fo høvi til at vitja umborð. Ein sera fyrikomandi og fryntligur bretskur skipari beyð okkum kaffi og blíðskap. Okkum, ja har vóru eisini tvey umboð fyri Faroe Ship, Jonhard Johannesen, sum stendur á odda fyri umboðsdeildini og Hanus Jøkladal, ið hevur arbeitt á deildini í fleiri ár og javnan vitjar umborð á útlendskum frálandsskipum, sum koma á Havnina. Eisini sølumaðurin hjá MEST, Òli Poulsen, varð á staðnum fyri at kunna um tænasturnar, sum MEST hevur at bjóða. Tað er ikki so sjáldan, at tað eru umvælingaruppgávur til MEST, tá útlendsk frálandsskip koma til Føroya fyri eitt nú at skifta manning.

Á brúnni fingu vit innlit í arbeiði umborð á slíkum fari, ið er serútgjørt til at veita bjargingartænastur, um okkurt skuldi hent á leiðunum, har olja verður framleidd ella har verður borað eftir nýggjum oljukeldum.

Caledonian Victory er útbgjørt við tveimum ovurstórum bjargingarbátum, eisini nevndur ARRC, sum hvør er mannaður við seks monnum. Tilsamans eru 28 mans við skipinum, sum eisini veitir vanligar flutnings- og hjálpartænastur. Hetta er eitt sokallað “multi purpose” skip, sum er nógv eftispurt í oljuvinnuni. Tilsamans hevur reiðaríið fýra  av hesum slagnum. Hini trý arbeiða í Norðstjónum.

Men nú nýggi boripallurin, sum Odfjell Drillig hevur  latið byggja í Korea og sum er leigaður út til BP í nøkur ár, er klárur og verður á Hetlandsleiðunum innan seks vikur, verður tørvur á fleiri av Caledonian slagnum at røkja Hetlandsleiðirnar.

BP fer í næstum undir at bora upp til 12 brunnar á Clair-feltinum og har um leiðir. Hetta fyri at kunna økja um framleiðsluna har. Higartil er útbygd ein framleiðslueind og tann næsta, Clair Ridge er ávegis. Síðani hava tey í BP vónir um við nýggja pallinum Deepsea Aberdeen at finna øki í Clairumhvørvinum, har tað ber til í framtíðini at fremja uppaftur nýggjar útbyggingar. Clair, sum er størsta oljukeldan í Europa og sum liggur skamt millum Hetland og føroyska markið, er mett at goyma upp til 8-9 milliardir tunnur av olju.

Nú fleiri frálandsskip av Caledonian Victory slagnum fara at arbeiða vestan fyri Hetland, útilokar skiparin ikki, at tey fara eisini at brúka føroyska havn, tá hetta verður mett skilagott. Eitt er givið, og tað er, at tá tey skulu í eina útlendska havn uttan fyri ES eina ferð um árið sambært reglunum, og tey arbeiða vestan fyri Hetland, tá er upplagt at fara til Føroya. Og við vaksandi virksemi vestan fyri Hetlandi, merkir tað so eisini, at fleiri frálandsskip koma til Føroya at skifta manning.

Skiparin á Caledonian Victory útilokar heldur ikki, at økta leiti- og borivirksemið á Hetlandsleiðunum kann hava við sær, at reiðaríini fara at hyggja meira til Føroya eisini. Teinurin haðani til Føroya er stytri enn at fara til Aberdeen.

Hóast havnirnar í Lervick og Scalloway liggja tættari oljufeltunum enn tær í Føroyum, so vilja Føroyar fáa størri áhuga, sohvørt skipini koma til Føroya og fáa kunnleika til viðurskiftini her. Tað ræður tí um at fáa skipini henda vegin, soleiðis at tey kunnu siga øðrum frá møguleikum og umstøðum her. Skiparin á Caledonian Victory, sum var á Havnini allan mánadagin, er sera væl nøgdur við at vera komin til Havnar og fer hann eisini at siga starvsbrøðrunum á systurskipunum frá hesum møguleikanum, tá hesi í næstum gerast partur av tí vaksandi virkseminum á Clair-økinum.

Tá umboðsfólkini hjá Faroe Ship siga honum, at frá í summar verður flogið beinleiðis millum Vágar og Edinburg, heldur skiparin fyri, at tá liggur enn betri  fyri at koma til Føroya at skifta manning og harvið eisini keypa aðrar tænastur.












